UTTAN ÚR HEIMI

## Kunnu ikki revsast

Eftir boðum frá stjórnini í Washington hevur admiralurin Albert T. Church kannað, um hernaðarligir ella sivilir amerikanskir leiðarar kunnu ábyrgjast fyri, at fangar hava fingið ringa viðferð í Guantanamo, Irak ella í Afghanistan.

Frágreiðingin, sum admiralurin handaði Kongressini fyrradagin, er loynilig, men sambært amerikonskum fjølmiðlum er niðurstøðan, at tað ber ikki til at sekta nakran hernaðarligan ella sivilan leiðara fyri, at fangar hava fingið ringa viðferð. Admiralurin skrivar, at í kríggi kann tað vera neyðugt at nýta heldur harðliga framferð fyri at fáa fangar at avdúka tað, teir vita, og sum má metast at hava áhuga. Hann vil eisini vera við, at teir amerikonsku hermenninir vórðu ávirkaðir av mótpartinum, sum ikki altíð leggur so stóran dent á rættindi hjá fangum.

Albert T. Church skrivar kortini, at herleiðslan legði ov lítlan dent á at kunna hermenn og fangavørðar um, hvussu teir áttu at bera seg at, og tí kundi USA sloppið undan teimum nógvu atfinningunum, um meiri varð gjørt burtur úr kunningini, heldur hann.

## Átøk ímóti nýnazistum

Um slakar tveir mánaðir verður skipað fyri hátíðarhaldi í Týsklandi til minnis um, at 60 áru eru liðin, síðani nazistastýrið fall.

Í tí sambandi hava nýnazistarnir og aðrir víðgongdir høgrabólkar boðað frá, at teir fara at skipa fyri sínum egnu almennu tiltøkum, men tað vilja teir týsku myndugleikarnir ikki hoyra talan um. Eitt nú hava myndugleikarnir gjørt greitt, at nýnazistarnir sleppa ikki at skipa fyri mótmælisgongum fram við støðum í Berlin, ið eru reist til minnis um seinna heimsbardaga og jødatýningina.

Týskir politikarar hava leingi roynt at fáa dómsvaldið at banna nýnazistiskum flokkum, men fyri tveimum árum síðani sýtti grundlógardómstólurin fyri at banna flokkinum NPD at virka.

## Húsaeigarar gera kvetti

Húsaprísurin í Danmark er hækkaður so nógv í ár, at í teimum størru býunum er prísurin hækkaður umleið 1.000 krónur um dagin, skrivar Børsen.

Í realkreditfelagnum Nykredit siga tey, at í teimum dýrastu økjunum er prísurin hækkaður ímillum fimm og seks prosent síðani á nýggjárinum. Hetta er serliga galdandi í Keypmannahavn og har um vegir, men prísurin er eisini hækkaður í hinum stóru býunum. Orsøkin er tann lága rentan, og at fólk yvirhøvur hava fleiri pengar at ráða yvir. Ein onnur orsøk er, at tað eru fleiri keyparar enn seljarar á marknaðinum.

Seinastu dagarnar hava tekin verið um, at rentan fer at hækka í ár, men teir donsku sethúsameklararnir vænta, at hækkingin verður lítil, og at hon fer ikki at fáa stórvegis ávirkan á húsaprísirnar.

## Ríkir menn

Tíðarritið Forbes hevur enn eina ferð almannakunngjørt eitt yvirlit yvir heimsins ríkastu menn.

Har sæst millum annað, at Microsoft-stovnarin Bill Gates er heimsins ríkasti, og at hann eigur einar 260 milliardir krónur. Hetta er annars 11. árið á rað, at Bill Gates stendur á ovasta plássi í yvurlitinum. Næstur honum er landsmaður hansara Warren Buffet, sum eigur smáar 250 milliardir krónur, og á triðja plássi er Lakshmi Mittal, ið sambært Forbes eigur 140 milliardir krónur.

Tann ríkasti evropearin er sviin Ingvar Kamprad, ið eigur møblahandilsketuna Ikea. Hann eigur umleið 130 milliardir krónur. Ríkasti maður í Danmark, Mærsk Mc-Kinney Møller, eigur næstan 30 milliardir krónur, og tann mest múgvandi norðmaðurin, reiðarin John Fredriksen, verður hildin at eiga einar 18 milliardir krónur.

# Amerikanararnir viðganga mistak

**Amerikanararnir viðganga nú, at tað vóru ikki amerikanskir vaktarmenn, sum skutu italska fregnartænastumannin Nicola Calipari**

MISTAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í síðstu viku eydnaðist tað italskum fregnartænastumonnum at fría tíðindakvinuna Giulianu Sgrena frá gíslarænarum í Irak. Men tá fregnartænastumenninir vóru á veg til floghavnina í Bagdad við tíðindakvinnuni, skutu amerikanskir hermenn eftir bili teira. Ein av teimum italsku fregnartænastumonnunum doyði, og tíðindakvinnan varð særd.

Amerikanararnir hava síðani hildið uppá, at amerikanskir vaktarmenn skutu eftir bilinum, tí hann koyrdi alt ov skjótt, og tí bilførarin sýtti fyri at steðga. Hesum hava italsku myndugleikarnir víst aftur, og í gjár viðgekk amerikanska sendistovan í Bagdad, at tað vóru nakrir aðrir amerikanskir hermenn, sum skutu eftir bilinum, og at talan var um eitt mistak.

Italska uttanríkisráðið hevur fyrr upplýst, at bilurin við italiumonnunum steðgaði at kalla beinanvegin, tá amerikonsku hermenninir settu ein ljóskastara á hann. Men tá var longu ov seint.

# Løgdu hald á flogfar



*Lufthansa-flogfarið, sum teir 56 iranararnir løgdu hald á*

**56 útlagnir iranar løgdu hald á eitt flogfar hjá Lufthansa fyri at gera vart við sína misnøgd við prestastýrið í Teheran**

MÓTMÆLI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir 56 iranararnir fóru umborð í Lufthansa-flogfarið í floghavnini í Frankfurt, men tá flogfarið hevði sett seg í Bruxelles, sýttu teir fyri at fara út.

Iranararnir, sum eru ríkisborgarar í ymsum evropeiskum londum, gjørdu greitt, at talan var ikki um eitt flográn, og teir lótu eisini hini ferðafólkini og manningina sleppa úr flogfarinum. Ætlan teirra við átakinum var at vísa sína misnøgd við prestastýrið í Teheran, eins og teir vildu hava ES at leggja størri trýst á iransku leiðsluna.

Gjáramorgunin gjørdi belgiska løgreglan av at taka iranararnar úr flogfarinum. Ein talskvinna hjá løgregluni segði, at teir flestu gjørdu, sum løgreglan segði, men nakrir máttu berast út.

# Nógv norsk skip flagga út

**Higartil í ár eru 36 skip farin úr norsku altjóða skipaskrásetingini**

SKIP
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Alt færri og færri handilsskip sigla undir norskum flaggi. Tað kom týðiliga fram á aðalfundinum hjá norska reiðarafelagnum, sum var hósdagin.

Har varð upplýst, at í januar fóru 17 skip úr norsku altjóða skipaskrásetingini NIS, í februar fóru 17 afturat, og teir fyrstu dagarnar í mars vórðu uppaftur tvey skip skrásett aðrastaðni.

Um ársskiftið vóru 692 skip skrásett í NIS, og av teimum vóru 56 útlendsk, men reiðarafelagið væntar, at uppaftur fleiri skip fara úr skrásetingini. Formaðurin í felagnum, Johan G. Hvide, sigur við Aftenposten, at norska skrásetingin er ikki nóg góð samanborið við aðrar skrásetingar, og tí velja reiðaríini at skráseta skipini aðrastaðni.